# Sinnilig vika í Vágum

**Sinnisbati hevur farnu vikuna skipað fyri norðurlendskari summarlegu fyri fólk við sinnisbreki. Legan er liður í árligum tiltaki, sum norðurlendska meginfelagið hjá fólki við sinnisbreki skipar fyri. Hetta er aðru ferð, slík lega er í Føroyum**

SUMMARLEGA
*Edvard Joensen*



*Eit av høvuðsmálunum við norðurlendsku summarleguni fyri sinnisveik hevur verið hugni og samvera, sum tey eisini kundu njóta í góðveðrinum í Vágum fríggjamogunin*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:**
Árliga norðurlendska summarlegan fyri sinnisveik hevur verið hildin á Hotel Vágum síðan mánadagin. Legan endar sunnudagin, tá fólk fara heimaftur. Næsta summarlegan av hesum slag verður í Noreg, har nirska landsfelagið í tí sambandinum fer at hava 20 ára hald.

Talan er um árliga afturvendandi tiltak, sum »Nordisk Forening for Sosial og Mental Helse" skipar fyri. Hesin felagsskapur er norðurlendskt meginfelag hjá feløgunum í ymsu londunum. Føroyaki limurin í hesum meginfelag er felagið Sinnisbati.

Soffi Egholm, formaður í Sinnisbata, letur væl at summarleguni, sum verið hevur í Vágum hesar dagarnar.

Tað eru 117 luttakarar á leguni í ár, greiðir hon frá. Av teimum eru teir níggju føroyingar. Hinir eru úr øllum Norðurlondum, íroknað Álandi.

Fólk eru sera væl nøgd við leguna, sigur Soffi Egholm. Tey eru positiv og væl nøgd við tiltakið, hóast fleiri ferðir verður broytt í løgdu skránni, tí fólk ikki halda seg til at fara til uppsettu tiltøkini.

– Hesi fólkini eru soleiðis fyri at hóast tað kann tykjast áhugavert eina løtu at fyrireika seg til eitt nú ein gongutúr á Fjallavatn, kann tað næstu løtuna gerast so møtimikið, at tey setast aftur. Tey broyta ofta meining um hetta og hatta, greiðir Soffi Egholm frá. Og so er tað, at vit skulu hava onnur tiltøk klár at fara til, sigur hon.

Ikki tí, leggur hon afturat. Tað er eingin trupulleiki her hjá okkum, tí vit eru altíð von við at hava ein »Plan B«, tá vit fyrireika okkurt her. Tí plagar veðrið at syrgja fyri. Í hesum døgum hevur tó onkuntíð verið brúk fyri einum »Plan C« eisini, sigur hon.

### Grindaboð

Hetta hevur verið hendingaríkt, sigur Soffi Egholm. Gestirnir komu í Vágar mánakvøldið, har legan varð sett. Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður við almanna- og heilsumálum, helt ein fyrilestur um framtíðar psykiatri í Føroyum, sum luttakararnir hava tosað nógv um síðan, sigur hon.

Men hæddarpunktið á leguni higartil hevur tó verið týsdagurin, tá øll endaðu í grind í Bø.

Dagurin byrjaði við útferð til Mykinesar, har upplivilsini vóru nógv. Og so mitt í øllum vóru tey stødd í eini grind. Tey vóru við til at reka, og hetta festi seg í sinnið hjá teimum, greiðir formaðurin í Sinnisbata frá.

Hon leggur dent á, at eingin teirra yvirhøvur hevur fingið nakað negativt upplivilsi av hesum, sum fyri mong kann tykjast ógvusligt. Heldur hinvegin.

Greitt er teimum frá, hvussu hetta við grindadrápi í Føroyum hevur verið skipað gjøgnum øldir, og tað skilja tey væl.

Og sum sonnum ferða- og grindafólki sømir seg, hava tey eisini nýtt høvið at fáa sær eitt minni við. Onkur teirra hevur beinleiðis fingið part, so at siga. Tey hava fingið sær grind, sum goymd verður í fyrstiboksini til at hava heim aftur við sær og royna, tá tey koma aftur til sín sjálvs.

Eisini onnur tiltøk hava verið á skránni. Eitt nú gongutúrar í Vágum. Útferð í Suðurstreymoy var eisini á skránni ein av døgunum, eins og ein flogbóltskapping hevur verið á Giljanesi. Hann vunnu føroyingarnir, sigur Soffi Egholm, og teir skuldu so fáa heiðursmerki handað á samkomu á Hotel Vágum fríggjakvøldið.

### Hugni og felagsskapur

Stóri denturin hevur verið lagdur á at hugna sær á hesi leguni, sigur formaðurin í Sinnisbata. Náttúra, sinni og felagsskapur er slagorðið hjá teimum, sum skipað hava fyri.

Hóast fólk hava verið aktiv allan dagin og viðhvørt eru heldur fyriløgst út á kvøldið, hava tey tó verið sera røsk at luttaka í teimum felags tiltøkunum, sum verið hava um kvøldið. Og tað hava eisini verið positiv upplivilsi, har eru komin burturúr, sigur Soffi Egholm.

Her eru fólk við góðum, skapandi evnum. Fólk hava millum annað lisið upp okkurt, tey sjálv hava skrivað, greiðir Soffi Egholm frá.

Hóast ein arbeiðsbólkur hjá Sinnisbata hevur staðið fyri praktisku fyrireikingunum av summarleguni í Vágum, er tað tó ein norðurlendskur kanningarbólkur, sum hevur valt staðið.

Tað er soleiðis, at tað er ein stevnunevnd, um so kann sigast, sum finnur fram til og góðkennir ymsu støðini, har legur verða hildnar. Og nú eitt av høvuðsmálunum við hesi leguni skuldi vera náttúra, vórðu Vágar valdar út sum eitt sera vælegnað stað.

Kortini er hotelkapasiteturin í so lítil, so neyðugt hevur verið at havt fólk búgvandi í húsunum hjá Sørvágs Húsmøðrafelag og í Zarepta í Vatnsoyrum. Eisini er onkur farin til Havnar at sova, sigur Soffi Egholm. Men øll tiltøk, ið verið hava, hava tó verið skipað við Hotel Vágum sum miðstøð.

Í sama viðfangi nevnir hon Atlantsflog sum ein rættiliga góðan samstarvsfelaga í hesum tiltakinum. Har hava tey skipað fyri øllum ferðum til og frá bústaði hjá fólki, umframt at ferðatilboðini hava verið rættiliga rímilig, sigur formaðurin í Sinnisbata, sum metir, at luttakararnir á norðurlendsku summarleguni fyri sinnisveik 2004 fara heim aftur við positivum minnum frá leguni.



*Norðurlendsku fløggini uttan fyri Hotel Vágar staðfesta, at her er norðurlendsk samvera*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Nýggjur dagstovnur á Oyrarbakka

**Sunda Kommuna er farin undir at byggja nýggjan dagstovn á Oyrarbakka. Frítíðarskúli verður eisini í sama bygningi**

DAGSTOVNUR
*Edvard Joensen*



*Sunda Kommuna byggir dagstovn, sum skal hýsa vøggustovu, barnagarði og frítíðarskúla í sama bygnini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Oyrarbakka:**
Sunda Kommuna byggir nýggjan stovn, sum skal hýsa børnum frá vøggustovu til frítíðarskúla í sama húsi. Stovnurin liggur beint sunnan fyri skúlan á Oyrarbakka.

Nýggi bygningurin verður í tveimum hæddum, sigur Hjalgrím Dahl, virkandi borgarstjóri í Sunda Kommunu. Í ovaru hæddini verður pláss fyri 94 børnum í vøggustovu- og barnagarðsaldri. Í kjallaranum fer so frítíðarskúlin at húsast, sigur hann.

Í dag húsast vøggustova og barnagarður úti á Oyri, og frítíðarskúlin er á Oyrarbakka. Men um eitt ár ella so fara øll børnini, sum verða ansað kommunalt í Sundalagnum, savnað í einum bygningi, sum er granni hjá skúlanum. So av sonnum kann tá sigast, at framtíðin er miðsavnað sunnan fyri Streym, sigur Hjalgrím Dahl.

Tað er Jóan Petur Vang, byggimeistari á Oyrarbakka, sum stendur fyri byggingini av nýggja dagstovninum hjá Sunda Kommunu, sum væntandi fer at kosta einastaðni millum níggju og tíggju milliónir krónur, sigur virkandi borgarstjórin í Sunda Kommunu.





*Formaðurin í skúlaleiðarafelagnum, Hanus Joensen, heldur tað verða alneyðugt, at okkurt verður gjørt við støðuna í føroyska fólkaskúlanum sum skjótast.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Støðan er hættislig í fólkaskúlanum

**Formaðurin í skúlaleiðarafelagnum, Hanus Joensen, sigur, at føroyski fólkaskúlin er so nógv skerdur, at illa ber til at geva næmingum við serligum tørvi røttu tilboðini**

SKÚLAVERK
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Játtan til føroyska fólkaskúlan er nógv skerd seinnu árini, samstundis sum krøvini til skúlaverkið bara vaksa. Hetta er niðurstøðan hjá formanninum í skúlaleiðarafelagnum, Hanus Joensen, ið til dagligt er skúlastjóri í einum av størstu skúlunum í landinum, Kommunuskúlanum í Havn.

### Kunnu ikki blíva við at fylla stovurnar

Hanus Joensen sigur, at eitt av aðalmálunum í føroysku fólkaskúlalógini er, at skúlin skal verða fyri øll. Hetta merkir, at eisini teir næmingar, ið hava serligan tørv, skulu rúmast í vanligu skúlunum. - Um so er, at vit skulu liva upp til orðingina "skúlin fyri øll", er tað altavgerandi, at vit eisini hava amboðini til tað, og tað hava vit ikki í løtuni, og vit hava heldur ongantíð havt tey, sigur Hanus Joensen. - Tískil klára vit ikki at liva upp til okkara endamál, og tað er ógvuliga harmiligt, heldur formaðurin í skúlaleiðarafelagnum.

Herfyri kom fram, at skerjingin í tímatalinum hjá teimum einstøku skúlunum hevði við sær, at fleiri skúlaleiðarar kring landið noyddust at tamba lógina til tess at fáa kabaluna at ganga upp. Til hetta sigur Hanus Joensen, at tað kann ikki verða rætt, at vit noyðast at blíva við at fylla stovurnar upp við næmingum, tí at tímatalið lækkar. - Hjá miðnámsskúlunum ber til at siga, at teir taka færri næmingar inn, men vit hava skyldu til at taka øll inn. Hetta er ein ótolandi støða, og tað skerst ikki burtur, at í slíkum støðum, har næmingatalið í einum flokki er uppi á kanska 27 næmingum, er tað oftast teir veiku næmingarnir, ið eru við sviðið soð. Tískil kunnu vit vænta, at spjaðið millum teir góðu og teir veiku næmingarnar bara vaksur, sigur Hanus Joensen. - Hetta her við at tamba lógina er ikki uttan kostnað bæði fyri undirvísingina og næmingarnar, sigur formaðurin í skúlaleiðarafelagnum. – Vit hava alt ov lítið av amboðum og fíggjarligari orku til, at vit kunnu røkka okkara endamálið, sigur Hanus Joensen og leggur afturat, at hann veit ikki, um tað eru skúlamyndugleikarnir ella politikkarnir, ið hava ábyrgdina, tí tað eru skúlamyndugleikarnir, ið hava skyldu til at boða politikkarunum frá, hvønn fíggjarligan tørv føroyski fólkaskúlin hevur.

### Næmingar við serligum tørvi raðfestast hægri

Tað er einki dulsmál, at eitt nú næmingar við atferðartrupulleikum hava tað trupult í einum vanligum skúla. Hesir næmingar hava tørv á nøkrum øðrum tilboðum enn tí, sum vit kenna úr føroyska skúlaverkinum, og tað er júst hesi tilboð, ið Hanus Joensen eftirlýsir. - Vit hava ikki tey tilboð til hesar næmingar, ið grannalondini hjá okkum hava, og tað verður ógvuliga trupult hjá okkum at hava besta skúlan í Norðanlondum um nøkur, soleiðis sum ætlanin er, um vit ikki hava eina viftu av tilboðum til teir næmingar, ið hava serligan tørv, vísir Hanus Joensen á.

– Tað er eisini ein stórur trupulleiki hjá okkum, at vit ikki hava fólk við serkunnleika innan hetta øki, tí tað er alneyðugt, um vit skulu hjálpa hesum børnum. Á Sernámsdeplinum, sum hjálpir okkum í sambandi við børn við serligum tørvi, eru til dømis alt ov fáir sálarfrøðingar. Onkuntíð eru teir tveir og onkuntíð bara tann eini, og tað er undir alt lágmark, heldur Hanus Joensen. - Fyri at vit kunnu hjálpa hesum børnum, er tað eisini umráðandi, at tey hava eina diagnosu, tí tað ger tað beinan vegin lættari hjá okkum at finna fram til, á hvønn hátt vit kunnu hjálpa teimum, og tískil er tað so umráðandi, at vit hava nóg mikið av serkønum fólki, sigur hann. – Eisini haldi eg tað verða løgið, at eitt nú børn við atferðartrupulleikum hava stuðul, tá ið tey ganga í barnagarði, men tá ið tey so koma í skúla, er eingin stuðul. Har noyðist at verða eitt tættari samstarv millum ráðini, so at talan verður um eitt meiri glíðandi skifti frá barnagarði til skúla, og møguligani at stuðulin fylgir við barninum inn um skúlans gátt, heldur Hanus Joensen.

### Ongir pengar til eftirútbúgving

Um so er, at næmingar við serligum tørvi skulu rúmast í fólkaskúlanum, er tað eisini neyðugt, at lærarafjøldin verður skúlað til at taka sær av hesum børnum. Formaðurin í skúlaleiðarafelagnum sigur, at nú er so lítið av pengum, at flestu skúlar hava ikki ráð til at senda fólk á skúla at nema sær eftirútbúgving ella bara á eitt styttri skeið. – Herfyri høvdu vit fund í skúlaleiðarafelagnum, og har søgdu fleiri skúlaleiðarar, at teir høvdu ongar møguleikarar fyri at senda fólk á skeið, tí tað vóru ongir pengar til tað, greiður Hanus Joensen frá.

Eisini fílist formaðurin í skúlaleiðarafelagnum á, at tað somuleiðis er ein trupulleiki, at leiðararnir á teimum ymisku skúlunum kring landið ikki hava nakrar reglur at halda seg til. – Eingin tímir at søkja leiðarastarv í føroyska skúlaverkinum, tí arbeiðsbyrðan er so ómetaliga stór, og umsitingin og námsfrøðisliga leiðsla tekur nógva tíð. Harafturat eru ongar reglur á økinum, sum lýsa arbeiðið hjá skúlaleiðarunum, sigur Hanus Joensen.

Skúlastjórin í Kommunuskúlanum heldur, at um vit blíva við at lata eyguni aftur fyri øllum trupulleikunum, soleiðis sum vit leingi hava havt lyndi til, gongur tað út yvir allar næmingar í føroyska skúlaverkinum, og tí er tað alneyðugt, at okkurt hendir sum skjótast, sigur hann at enda.